Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Høgni Hoydal, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Hestleiðin – nøgdsemi, batar og ætlanir eftir at Sandoyartunnilin er tikin í nýtslu

Spurningar:

1. Hvørji skjalprógv hevur landsstýrismaðurin fyri uppáhaldunum í svari til fyrispurning frá undirritaða um Hestleiðina um, at fastbúgvandi í Hesti sum heild eru nøgd við ferðaætlanina á Hestleiðini?

2. Heldur landsstýrismaðurin, at tað er rættvísandi, tá ið hann í sama svari brúkar hagtøl um miðal ferðafólkatalið við Spógvanum, á túrunum, har ið hann ikki hevði tilkalling um morgnarnar, sum grundgeving fyri at niðurleggja túrin kl. 07.00?

3. Hvat hugsar landsstýrismaðurin ítøkiliga, tá ið hann í sama svari sigur, at Strandferðslan nevnir møguleikan, at Erla Kongsdóttir kann sigla nakrar túrar – t.d. túrin kl. 07.20 – sum eina royndarverkætlan – t.e. eru nakrar fyrireikingar gjørdar til, at Erla Kongsdóttir kann leggja at í Hesti?

4. Hvussu hugsar landsstýrismaðurin, at tað skal bera til at pendla til arbeiðis ella fara til eitt nú frítíðarvirksemi hjá Hestfólki – og hvussu skulu fólk, ið hava tørv á hesum, kunna velja at seta búgv í Hesti?

5. Kann landsstýrismaðurin geva eitt ítøkiligt svar um, hvørjar ætlanir eru fyri Hestleiðina, eftir at Sandoyartunnilin er tikin í nýtslu?

Viðmerkingar:
Landsstýrismaðurin svaraði tann 21. oktober 2021 § 52a-fyrispurningi frá undirritaða um Hestleiðina.

Svarið reisti tó fleiri spurningar og tørv á skjalprógvum og grundgevingum.

Tí verða hesir uppfylgjandi spurningar settir.

Á Løgtingi, 15. november 2021

Høgni Hoydal